Tíðindablaðið **sosialurin**
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Høgni Mohr
**Ítróttur:** Jákup Mørk
**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin
**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir
**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820
**Telefax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** P/F Prentmiðstøðin

# Landsstýrið og framtíðin

*Oddagrein*

SEINASTA veljarakanningin gevur landsstýrinum ein frammaná. Tað missir meirilutan. Tveir av andstøðuflokkunum megna einsamallir at manna landsstýrið út frá veljarakanningini. Tvs. at teir hava ikki brúk fyri at hava ein annað lítlan flokk sum stuðul, og tað er í sær sjálvum rættiliga áhugavert. Eingin ivi er um, at løgmaður hevur fingið nakað at hugsa um, nú veljarakanningarnar ikki bert taka grundarlagið undan samgongumeirilutanum, men eisini raka hansara egna flokk sera meint. Úttalilsini hjá Birgir Danielsen í Sosialinum herfyri tala eisini sína greiðu talu, og er veljarakanningin eisini ein staðfestin av teimum. Antin løgmaður vil tað ella ikki, so verður hann noyddur til at fyritaka sær nakað meira enn bara at breiða um seg við orðum um breiðar semjur og at fáa andstøðuna við osfr. Løgmaður, sum verður høgt virdur av mongum fyri sín høviska, fólkaliga og oftani eisini skilagóða atburð í hesum landsins hægsta embæti, má til at verða meira ítøkiligur. Hann veit eisini, at klichékendu úttalilsini eru føroyingar deyða troyttir av. Og eftir øllum at døma eisini hansara egnu floksfelagar, sum rýma í stórum tali frá flokkinum. Løgmaður skyldar tí bæði sínum egnu - tað verður so hansara søk - og øllum føroyingum - at spæla meira reint út. Hvat er tað hann meinar við, tá hann nú aftur hevur funnið sær gomlu frasuna úr skuffuni um breiða semju osfr. Breiðu semjuna, har andstøðan varð tikin uppí, megnaði hann at fyrigykla fólki í langa tíð, fyri síðani at sleppa henni aftur, tí hon var ikki møgulig. Nú hann hevur rent seg fastan er hann aftur farin at tosa um breiða semjuna!!!

LØGMAÐUR má koma út úr „buskinum". Nú má hann siga Føroya fólki, hvat hann ítøkiliga ætlar. Nú Javnaðarflokkurin so oftani hevur víst á ónøgdina við at verða hildin uttan fyri Tinganes, átti løgmaður kanska at spælt nýtt kort út, og tað er við adressu til Javnaðarflokkin. Hví ikki taka hann á orðið og bjóða honum uppí samgonguna, møguliga við at sleppa sær av við Sjálvstýrisflokkin, sum í veruleikanum er tann, ið forðar fyri eini breiðari loysn í sjálvstýrismálinum. Tí vóru Fólkaflokkurin, Tjóðveldisflokkurin og Javnaðarflokkurin í samgongu, tá hevði hetta kastað heilt nýtt ljós á allan spurningin. Tá má so Sjálvstýrisflokkurin ofrast. Ein kann eisini ímynda sær, at tað vildi verið eitt „smart trekk" hjá løgmanni at „tvinga" Javnaðarflokkin til at taka við ábyrgd Og tá er spurningurin, hvat Javnaðarflokkurin hevði gjørt! Ein nýggj men eisini spennandi politisk støða kundi hetta verið fyri at sleppa úr naggatódnini.

***Sosialurin***

## Viðmerking:

# Færøsk selvstændighed — det er vi mange der syntes er i orden

Godt Nyrup — du taler endelig skatteydernes sag.

Når man ser og hører radio og Tv — kan man blive så gal på færinger. Man sidder tilbage med et indtryk af, at vi skal betale for alle deres udgifter — uden at kunne tillade sig at sige noget.

Hvad skulle motivet — og begrundelsen i grunden være for at vi skulle betale for disse øers udgifter.
Og så betaler man endda mindre i skat på Færøerne end i Danmark !!!!!!!

Ja jeg kan kun se det som en almisse — der er jo ingen grund til at vi bliver ved med at betale — så ville jeg hellere have at disse penge kom andre nødlidende tid til gode her i landet !!!!!!

Derfor mener jeg at vi lige så godt som dem der bor på Færøerne - i Danmark — kunne stemme om hvorvidt vi vil have færingerne med i vores fællesskab.

Det er jo altid let at være med i et fællesskab hvis det ikke koster noget og er Færøerne kun med af økonomiske grunde — kan det vel være det samme.

**Tonny Rosing**
**Havremarksvej 1**
**4200 Slagelse**

# Viðvíkjandi norðurlendsku dupultskattaavtaluni fyri sjófólk

Maskinmeistarafelagið hevur nú fingið svar frá Fíggjarmálastýrinum upp á fyrispurning um broytingar í norðurlendsku dupultskattaavtaluna fyri sjófólk.

Í svarinum verður sagt, at skatting av føroyskum sjómonnum undir DIS-skipanini ikki verður ávirkað av broytingini í avtaluni.

Víst verður til § 154, 2. stk. í skattalógini, har heimild er fyri sama skattingarhátti, sum dupultskattaavtalan higartil hevur heimilað.

Fíggjarmálastýrið fer í næstum at geva boð til økisskrivstovurnar um, hvussu skatturin hjá sjómonnum undir DIS skal roknast eftir 1. januar 2001, sigur Maskinmeistarafelagið í tíðindaskrivi.

# Ítrótta- og Mentunarstevna í Føroyum

3. Ítrótta- og Mentunarstevna verður hildin í Føroyum hesaferð, har 6 ungdómar og 2 leiðarar koma úr hinum Norðurlondunum til Føroya at luttaka á einari Ítrótta- og Mentunarstevnu, sum verður í Suðuroy 1.–6. juli og í Havn 6.–8. juli. Undanfarin ár hevur hetta tiltak verið í Íslandi í 1998 og í Grønlandi í 1999.

Ungdómarnir, sum eru í aldrinum 16–18 ár, skulu greiða hinum luttakarunum frá um landið og mentanina úr tí landi tey koma frá, umframt at tey koma at uppliva ta vøkru føroysku náttúruna.

Hetta er sera gott høvi hjá Føroyum at vísa norðurlendingum, hvat ið vit hava at bjóða av ymiskum, tí hesi fólkini, sum koma hendanvegin, eru framtíðar ítróttarleiðarar.

Hetta er sera gott høvi hjá Føroyum at vísa norðurlendingum, hvat vit hava at bjóða av ymiskum, tí hesi fólkini, sum koma hendanvegin, eru framtíðar ítróttaleiðarar.

Tey koma til landið við flogfarinum hjá Atlantsflog, sum hevur útvegað sera bíligar ferðaseðlar, og skulu tey búgva í skúlanum í Trongisvági, meðan tey eru í Suðuroy, har Tvøroyrar kommuna hevur víst vælvild við at lata luttakararnar búgva og nýta ítróttarhøllina ókeypis.

Annars verður tiltakið samskipað við ferðavinnuna í Suðuroy og verður tað Anna Djurhuus frá TB, sum verður høvuðssamskipari fyri tiltakinum í Suðuroy.

# Listaframsýning á torginum í SMS

*Elisabeth Pike, fødd Joensen, sum býr í Kanada, vitjar heimlandið við sínari list*

Elisabeth Pike hevur í mong ár, við millumbilum, verið heima og havt framsýningar.

Tey fyrstu árini vóru tað serstakliga vevmyndirnar hon hevði at sýna fram. Hesi seinastu árini hevur málningalistin vunnið ein stóran part av hennara áhuga.

Litir og drama eyðkenna nógvar av myndunum. Motivini tykjast at vera tikin frá løtum í lívi hennara, ið hava givið sterkar og djúpar kenslur.

Elisabeth Pike er í løtuni við at enda sína útbúgving sum Bachelor of Fine Arts á Ontario College of Art and Design í Toronto.

Framsýningin er opin alla vikuna 3.-8. juli frá kl. 10-18.

# Vakrasta ellisakfar á Sundalagsstevnuni

Fólk, ið vitjaðu í Kollafirði á stevnuni sunnudagin høvdu høvi at kjósa vakrasta ellisakfarið.

Hetta er aðru ferð, at KÍF skipar fyri framsýning av ellisakførum við skúlan í Kollafirði. Hesaferð vóru 12 ellisakfør á framsýningini.

Áskoðararnir høvdu høvi at kjósa tann bilin, tey hildu vera vakrastan, og fekk MGB bilurin hjá Zachariasi Leitisstein í Runavík frá 1959 flestar atkvøður.

Hendan bilin keypti Zacharis Leitisstein úr USA fyri nøkrum árum síðani, har hann hevði tænt eini djóralæknakonu.

Tað vóru ikki tey elstu ellisakførini í Føroyum, sum vóru á framsýningini, tí vinnandi bilurin var tann elsti. Umframt hendan sportbilin vóru tveir aðrir líknandi bilar. Hinir vóru vanligir persónbilar í Føroyum frá seksti og sjeytiárunum.

Elsti bilur í Føroyum er ein Ford T frá 1915.



*Hesin MGB bilurin frá 1959 varð kosin vakrasta ellisakfarið á framsýningini, sum KÍF skipaði fyri á Sundalagsstevnuni sunnudagin*
**Mynd: John Johannessen**



# Samgongan ósamd um skattalætta

*Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur gjørt av at avmarka skattalættan til fiskimenn. Men hetta hóvar ikki Fólkaflokkinum*

JOHN JOHANNESSEN

Eftir fyrsta januar 2001 skal skattalættin hjá fiskimonnum fella burtur, tá inntøkan er komin upp um eitt ávíst mark.

Hetta hevur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Karsten Hansen úr Tjóðveldisflokkinum, gjørt av.

Men hin stóri flokkurin í samgonguni, Fólkaflokkurin, tekur ikki undir við hesi avgerð. Anfinn Kallsberg, løgmaður, fatar hetta, sum at skatturin hjá sjómonnum verður hækkaður, og tí er hann persónliga ímóti.

– Eg eri ímóti øllum ætlanum um at hækka skattir. Heldur vil eg, at allir skattir skulu lækka, sigur Anfinn Kallsberg.

**Hevur fulla heimild**

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur kortini fulla heimild at seta mark á skattalættan hjá sjómonnum. Hesa heimild fekk landsstýrismaðurin, tá løgtingið í 1997 samtykti lógina um skattalættan.

Upprunaliga ætlaði tingið at seta eitt mark í lógina á 500 túsund krónur. Men tá tað var greitt, at tað ikki fór at bera til hjá telduskipanunum hjá Elektron at rokna skattin við hesum marki, valdi tingið í staðin at geva landsstýrismanninum heimild til at áseta markið seinni, tá útgerðin var dagførd.

Hesa heimild hevur landsstýrismaðurin, Karsten Hansen úr Tjóðveldisflokkinum, nú valt at nýta.

**Missa skattaborgarar**

Anfinn Kallsberg sær stóran vanda í, at mark verður sett á skattalættan. Hann vísir á, at avleiðingin av hesum kann gerast, at yvirmenn við góðari hýru umborð á útlendskum skipum velja at flyta aðrastaðni at gjalda skatt.

Tí ætlar Anfinn Kallsberg sær at arbeiða ímóti ætlanini hjá Karsteni Hansen, tá hon skal viðgerast politiskt í samgonguni.

Tað er nevnilga soleiðis, at ætlanin skal leggjast fram og viðgerast politiskt í landsstýrissamgonguni, hóast landsstýrismaðurin hevur fullan avgerðarætt í hesum føri.

**Hóttir ikki samgonuna**

Hóast Fólkaflokkurin og Tjóðveldisflokkurin eru ósamdir í hesum máli, vænta hvørki Anfinn Kallsberg ella Karsten Hansen, at spurningurin kann gerast ein hóttan móti samgonguni.

Karsten Hansen sigur seg rokna við, at Fólkaflokkurin ikki fer at seta seg ímóti avgerðini, tá av tornar. Hann vísir á, at ætlanin bert kemur at raka nakrar fáar av føroysku fiskimonnunum, og harafturat er talan bert um smáar upphæddir, hesir koma at gjalda meira í skatti.

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum heldur tað vera heilt náttúrligt, at fiskimenn halda uppat at fáa skattalætta, tá inntøka teirra kemur upp um hálvu milliónina, soleiðis, at latast kann út aftur á ein ella annan hátt til tey, ið eru veikari fyri fíggjarliga.

– Hetta gevur okkum møguleika at geva teimum lægri løntu skattalætta, sigur Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum.

Tað er enn ikki greitt, hvussu høgt markið fyri skattalættan skal vera. Men Karsten Hansen roknar við, at tað fer at liggja nær hálvu milliónini, tingið í 1997 ætlaði tað skuldi vera.


*Eftir fyrsta januar 2001 skal skattalættin hjá fiskimonnum fella burtur, tá inntøkan er komin upp um eitt ávíst mark*

# Bóltaði út av vegnum

*Ein bilur fór út av vegnum í Gassádali seinnapartin sunnudagin. Førarin, ein ung kvinna, fekk bert smávegis snuddir*

SVEINUR TRÓNDARSON

Seinnapartin sunnudagin hendi eitt ferðsluóhapp í Gassádali beint oman fyri Vestmanna.

Ein bilur, sum var á veg norðureftir, kom ov langt út móti vegjaðaranum og fór út av vegnum. Av løgreglustøðini í Havn skilja vit, at bilurin fór runt eftir at hann var farin út av.

Vakthavandi á støðini í Havn sigur, at orsøkin til óhappið var ósketni. – Hon er komin ov langt út í borðið uttan at hava fingið snarað inn aftur á vegin, og tí er hon farin út av, sigur vakthavandi.

Gentan fekk smávegis snudd í høvdið, men tað var ikki verri enn so, enn at læknin kláraði tað, sigur vakthavandi á støðini í Havn.



*Bilurin fór illa, og gentan, sum koyrdi, fekk smávegis snudd í høvdið*
**Mynd: Jens Kristian Vang**

Pakkaferðir 2000 summarið
www.smyril-line.fo
SMYRIL LINE
Tel 34 59 00

Danmark
Danland íbúðir
1 vika í frítíðaríbúð
úr 13.219,-

DanCenter summarhús
1 vika í summarhúsi
úr 11.882,-

Noreg
Pers Hotel í Gol
1 vika í summarhúsi
úr 8.905,-

Hetland
Easterhoull Chalets
1 vika í summarhúsi
úr 7.962,-

Bilferia í Europa
Weissenhäuser Strand í Norður-Týsklandi
1 vika á frítíðardepli
úr 13.335,-

• • • fyri 2 vaksin & 2 børn í bili • • • fyri 2 vaksin & 2 børn í bili • • • fyri 2 vaksin & 2 børn í bili • • • fyri 2 vaksin & 2 børn í bili • • •

Pakkaferð Ísland
Key Hotellini
við 7 daga innivist á hotelli í dupultkamari
úr 4.033,-
fyri hvønn

Sigl & Flúgv
Siglt verður annan vegin og flogið hinvegin
Tórshavn - Hanstholm
og Keypmannahavn - Vágar ella hinvegin
úr 2.445,-
fyri hvønn

e-mail: booking@smyril-line.fo